Til Xxxxx, skúlaleiðara

**Boðskriv um skyldur í mun til lógina um arbeiðsumhvørvi**

Kommunalir fólkaskúlar eru skipaðir við skúlaleiðara, deildarstjóra, aðalstjóra og landsstýrisfólki. Skúlaleiðarin hevur dagligu ábyrgdina at leiða og fordeila arbeiði í fólkaskúlanum. Skúlaleiðarin skal síggja til, at arbeiðsviðurskiftini eru góð og at trygdin í kommunala fólkaskúlanum er í lagi.

Endamálið við arbeiðsumhvørvislógini er sambært § 1 at virka fyri tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi. Sum skúlaleiðari hava tygum ávísar skyldur sambært lógini um arbeiðsumhvørvi og verður mælt til, at tygum seta tygum inn í krøvini í lógini um útinnan av arbeiði, um arbeiðsplássið, um tøknilig hjálpartól, evni og tilfar.

Niðanfyri eru tilskilað høvuðskrøvini, sum skúlin skal lúka til tess at tryggja, at arbeiði á skúlanum verður gjørt forsvarligt, hvat trygd og heilsu viðvíkur.

**Trygdarskipan**
Í smáum skúlum, 1-9 starvsfólk, eiga viðurskiftini, hvat trygd og heilsu viðvíkja, at fara fram soleiðis, at mest møguligt samband er millum skúlaleiðaran og hini starvsfólkini á skúlanum, sí § 4 í lógini.

Skúli, ið hevur fleiri enn 10 starvsfólk, skal samskipa viðurskiftini, hvat trygd og heilsu viðvíkur. Henda samskipan verður gjørd í eini trygdarskipan, har Arbeiðsleiðarin fyri einum virkisøki (Skúlaleiðarin) skal saman við einum trygdarumboði skipa ein trygdarbólk fyri tað ávísa arbeiðsøkið, sí § 5. Hvussu nógvar trygdarbólkar, skúlin skipar, tekur skúlaleiðarin avgerð um, í mun til hvussu fjøltáttaður og stórur skúlin er.

Skúli, ið hevur fleiri enn 20 starvsfólk, skal skipa trygdarnevnd. Stødd og samanseting av trygdarnevndini framgongur av § 6. Trygdarnevndin fyriskipar, leiðir, ráðgevir, kunnar og hevur eftirlit við trygdar- og heilsuumstøðunum/arbeiðnum á skúlanum.

Skúlaleiðarin sær til, at tey, sum eru umboð í nevndu bólkum, og um neyðugt, at øll starvsfólkini, fáa tey av Arbeiðseftirlitinum fyrisettu boð, sí § 17 um trygdina á arbeiðsplássinum.

**Upplýsing**
Tygum eiga at kunna starvsfólkini um vanlukku- og heilsuvandar, ið møguliga eru tengdir at arbeiði teirra, og upplæra og leiðbeina um, hvussu arbeiði verður gjørt so vandaleyst sum gjørligt.

Tygum eiga harumframt at upplýsa starvsfólkum skúlans, at tað eisini áliggur teimum at boða frá breki ella manglum, sum kunnu føra til vanlukkutilburðir ella sjúku hjá starvsfólki ella næmingum. Í hesum sambandi eigur at verða kunnað um trygdarskipan skúlans, soleiðis at starvsfólkini vita, hvussu fráboðast skal. Sí § 21, stk. 2.

**Mannagongd at nýta, tá brek skulu fráboðast:**
Verða tygum varugur við brek ella manglar, sum kunnu føra til vanlukkutilburð ella sjúku hjá starvsfólkum og næmingum, skulu tygum beinanvegin síggja til, at neyðug tiltøk verða framd fyri at forða fyri, at vanlukka ella sjúka stendst av hesum. Eru viðurskiftini av slíkum slag, at skúlin ikki megnar at seta tiltøk í verk at forða fyri vanlukku ella sjúku hjá starvsfólkum og næmingum, eiga tygum beinanvegin at kunna Mentamálaráðið um støðuna. Sí § 21.

Tað er umráðandi, at tygum fráboða um viðurskifti, sum kunnu hugsast ikki at vera í tráð við krøvini í lógini. Í skaðastøðu kann skúlaleiðarin, vísandi til delegatiónina um at útinna arbeiði á skúlanum, ábyrgjast fyri einum skaða vísandi § 64 í lógini um subjektiva ábyrgd.

Tá talan er um at seta tiltøk í verk í mun til bygningin, eiga tygum at seta tygum í samband við kommununa, sum varðar av bygninginum. Kommunan og tygum meta um støðuna og seta í verk neyðug tiltøk.
Áðrenn møgulig tiltøk verða sett í verk, skulu hesi ummælast av Arbeiðseftirlitinum. Sí § 37, stk. 3

Verða ábøtur ella umbygging gjørdar á skúlan orsakað av lógarásettum krøvum, er talan um mál hjá kommununi og Mentamálaráðnum, sum góðkennandi myndugleika í byggimálum.

Olaus Jespersen, deildarstjóri